# 10 TING UM MERYL STREEP

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein




## Mest heiðraði sjónleikarin

Í HESUM DØGUM ER HON **AKTUELL Í SKEMTIFILMI**, MEN HON VANN FRAM OG ER KEND FYRI TEIR ÁLVARSOMU **LEIKLUTIRNIR**, HON HEVUR HAVT Í KENDUM HOLLYWOOD FILMUM. HER ERU NAKRIR UPPLÝSINGAR UM **MERYL STREEP**

**1** Mary Louise Streep varð borin í heim í Summit í New Jersey. Forfedrarnir hjá henni stava úr Sveis, Írlandi, Onglandi og Hollandi.

**2** - Tað var eyðsýnt, at hon fór at gerast ein stórur sjónleikari, segði rektarin á Yale School of Drama, tá í hann skuldi meta um avrikini hjá Meryl Streep á skúlanum.

**3** **Hon spældi fyrstu ferð sjónleik í 1971, tá ið hon var við í leikinum The Playboy of Seville. Í 1977 var hon fyrstu ferð við í spælifilmi.**

**4** Stóra gjøgnumbrotið kom við filmunum The Deer Hunter og Kramer vs. Kramer frá 1977 og 1978. Hon var tilnevnd til Oscar virðisløn fyri báðar leiklutirnar og vann fyri seinna filmin.

**5** Eingin annar sjónleikari er tilnevndur til Oscar og Golden Globe viðirslønir sum hon. Hon hevur verið 15 ferðir uppskoti til Oscar og hevur vunnið tvær. Hon hevur verið tilnevnd til 25 Golden Glove og hevur vunnið sjey.

**6** Meryl Streep hevur vart væl um privatlívið hjá sær, og er kend sum ein sjónleikari, sum fer heim eftir loknan arbeiðsdag.

**7** Í 1990'unum vóru filmar við Meryl Streep ikki so væl umtóktir, sum teir plagdu at vera. Rithøvundin Karen Hollinger heldur, at ein orsøk til hetta var, at Meryl Streep hesa tíðina royndi at finna lættari leiklutir í eitt nú skemtifilmum.

**8** Meryl Streep hevur sagt, at áhugin fyri einum kvinnuligum sjónleikara hvørvur, tá ið hon kemur upp í 40'ini.

**9** **Hon hevur eisini verið á hitt-listum sum sangari, eftir at hon var við í filmatiseringini av Mamma Mia. Okay, víst var tað bara í Portugal, men tað má telja við.**

**10** Meryl Streep giftist í 1978 við myndahøggaranum Don Gummer.

## SITAT



*Túsundtals livandi ljós kunnu tendrast við einum ljósi, og lívið hjá ljósinum verður ikki styttri fyri tað. Gleðin veður ikki minni, um tú deilir hana.*

***Buddha***

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Tórnroos

## MIÐLARNIR OG EG

Í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.



KVÍVÍKARPRESTUR **THEODOR E. D. OLSEN** LESUR EUROMAN, "TANN LÍTLI PRINSURIN" OG VIL HOYRA SAMA FÓLK LESA ØLL ANDLÁT UPP HVØRT EFTIR ANNAÐ.

**MÍTT BLAÐ - DAG OG VIKUBLAÐ**
Dimma, Sosialurin, Trúboðin, Norðlýsið, Politiken og Kristeligt Dagblad.

**MÍN HEIMASÍÐA**
Byrjunarsíðan er portal.fo – og so surfi eg haðani...



**MÍN TÓNLEIKUR**
Allur góður tónleikur. Alt frá Händel til Herbie Hancock og Hanus..

**MÍTT SOSIALA NETVERK (TD FACEBOOK)**
Facebook og Skype. Eri ikki nýfikin, men taldist helst millum fyrstu føroyingar, sum fingu sær Facebook.

**MÍN DVD**
Nógvar. Men "Das Leben Der Anderen" og "Fanny & Alexander" kann eg altíð venda aftur til.

**MÍTT MAGASIN**
Sera breitt. Alt frá Euroman til Teol-information.




**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Dagur og vika, um tað kann kallast ein sjónvarpsrøð. Fawlty Towers, Klovn og Frasier kunnu eisini vera undirhaldandi.

**MÍN BÓK**
Sera torført at siga. Men "Det forsømte forår" og "Tann lítli prinsurin" gloymi eg aldrin.
Bíblian kann sjálvandi heldur ikki undirmetast á míni lívsleið.

**MÍTT ÚTVARP**
Útvarpið, Rás 2, Lindin. Viðhvørt lurti eg eftir P1 og P3 á DR.

**MÍN TELEFON**
Nokia eitt ella annað. Bara eg kann ringja og sms'a við henni.

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ?**
Tað er munur á at lurta og hoyra. Útvarpssendingar, sum ikki eru vælgjørdar, kann eg hoyra í bakgrundini. Eru tær góðar, lurti eg. Haldi tað var spell, at konseptið við Rás Tórshavn hvarv, og at tað nú er neyðugt at keypa heilar pakkar við fleiri ræsum, um tú t.d. bert ynskir at síggja public-service rásir sum DR1 og DR2.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Leiðandi spurningar, bendingarvillur og ov tætt kliptar útvarpssendingar. Síðan alt bleiv talgilt, hoyrir tú næstan ikki fólk anda inn longur, áðrenn tey svara onkrum av lívsins stóru spurningum. Tað hevði eisini verið gott, um ein og sama útvarpsrøddin las øll andlát upp hvørt eftir annað.

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Dyggar sendingar sum t.d. "Scannaran" og "Tilveru". Sendingar við teologiskari tyngd sum t.d. "Morgunlesturin".
Vælgjørdar tónleikasendingar sum t.d. "Rót og rútma", "Turné" og "Bolero".
Og hvar blivu fyrilestrar, hoyrispøl og upplestur av nýggjum bókmentir av í útvarpinum?